# Sniálvs táttur

1.
Nú skal falla niður um stund
viljið tær dømi trúgva:
Um hann Sniálv av Upplandi,
hagar skal frøðið snúgva.

*Niðurlag:*
*Há trummar í høll,*
*hermenn ríða,*
*jomfrú leikar í lundum*
*við tann edilmann*

2.
Sniálvur býr á Upplondum,
hans líki kann ikki finnast,
so lystir hann at stríðast
sum leika við streymi stinna.

3.
So lystir hann at stríðast,
sum leika við streymin stinna;
hann er eingin í verðini,
Sniálv yvirvinnur.

4.
Sniálvur býr á Upplondum,
hans líka man ei kann sjá;
so lystir hann at stríðast,
sum streymur leikar í á.

5.
So lystir hann at stríðast,
sum streymur leikar í á,
hann er eingin í verðini,
Sniálv yvirgár.

6.
Sniálvur fer til sína móður,
leitar við hana ráð:
hvar veit tú so væna jomfrú,
mær er sómi at fá!

7.
Tað var hansara sæla móður
sló so upp í gleim:
Mong er von á Upplondum;
tak tær ein av teim.

8.
Hoyr tað, mín hin sæla móðir,
eggja mær ei tann harm;
hon er eingin á Upplondum,
sova kann í mín arm.

9.
Hoyr tað, mín hin sæla móðir,
eggja mær ei tann kvíða,
hon er eingin á Upplondum,
íð svevur hjá mínu síðu.

10.
Tað er hansara sæla móðir,
mælir av tungum inna:
Hertugans dóttir í Brunsvík
er tú ikki maður at vinna

11.
Hertugans dóttir í Brunsvík
føgur er hon sum sól,
so er at líta á jomfrúkin
sumd droyri drýpur í snjó.

12.
Hon ber ikki bleika brá
undir sínum gula hári
heldur tann fagrasta summarsól,
íð fagurt skín um várið.

13.
Er hon so von og tekkilig,
sum tú sigur frá,
hagar skal eg streingja
míni bønarorðini á.

14.
Er hon so von og tekkilig,
sum tú sigur til,
hagar streingi eg heiti mítt,
tað stendst hvat av, ið vil.

15.
So letur hann Sniálvur
síni skipini gera,
allar letur hann streingirnar
av reyðargulli vera.

16.
Sniálvur letur snekkjur smíða
dreingir mundu gita,
av gulli vóru mastrarnar,
av silvri vóru bitar.

17.
Bræddir vóru brandar,
skorin var hvør stokk,
stavn og stýri av reyðargulli,
so var segl í topp.

18.
Vindur hann upp síni silkisegl,
gulli vovin við rand,
strikar ei á bunka niður
fyrr enn í Brunsland.

19.
Vindur hann upp síni silkisegl,
fáir finnast slíkir,
strikar ei á bunka niður
fyrr enn í Brunsvík.

20.
Ein maður kom í høllina inn,
sigur øllum frá:
eg sá skip av havi koma
seglini gul og blá.

21.
Sært tú skip eftir havi koma
seglini hvít sum lín,
vera man onkur høvdingur
at biðja dóttur mín´.

22.
Teir løgdu inn á Brunsvík
morgun ein so snimma,
tað var sum í bál at líta,
helst tá skeiðir dynja.

23.
Teir løgdu inn í Brunsvík
eina morguntíð,
tað var sum í bál at líta
skeiðir dynja í.

24.
Teir løgdu inn í Brunsvík
eina morgunstund,
tað var sum í bál at líta
skeiðir dynja í lund.

25.
Glaður leggur Sniálvur
inn á Brunsvíks vág,
hann vil hvørki strika, ei lúta,
skotini bresta á.

26.
Hertugin so til orða tekur,
letur so orðum fúka:
hetta man vera ein mikil maður,
ið hvørki strikar, ei lútar.

27.
Hertugin so til orðá tekur,
heldur  á brýndum knívi:
Sjúrður, gakk til strandar oman,
tak hann burtur av lívi.

28.
Hagar ið teirra snekkja
kendi fagurt land,
lótu síni akker falla
á so hvítan sand.

29.
Lótu síni akker falla
á so hvítan sand,
fyrstur stígur Sniálvur
sínum fótum á land.

30.
Fyrstur stígir Sniálvur
sínum fótum á land
tá var Sjúrður, hertugan son,
riðin niður til strand.

31.
Svaraði Sjúrður, hertugans son
kann vær tungu skilja:
Hvat eru tíni ørindi,
og hvat tykist tú at vilja?

32.
Sniálvur so til orða tekur,
kann væl tungu skilja:
Tað eru míni ørindi
frú Adalín at gilja.

33.
Svaraði Sjúrður hertugans son
heldur á gyltum brandi:
Sig mær, frægur heiti títt,
hvaðani er tú av landi.

34.
Sniálv skalt tú nevna meg,
í væl í víggi stár,
Ólavur kongur á Upplondum
var frægi faðir vár.

35.
Ólavur kongur á Upplondur
hann var ein kempa í ætt,
einum manni, Sniálvi,
havi eg hoyrt frá sagt.

36.
Sjúrður gekk frá strondum niðan
hugsar um tann vanda,
hvussi hann skuldi ráðini leggja,
so ikki ilt av skal standa.

37.
Mitt í miðjum grasagarði
akslar hann síni skinn,
og so búgvin gongur hann
for hertugan, faðir sín inn.

38.
Hertugin so til orða tekur,
heldur á búnum knívi:
Hoyr tá Sjúrður sonur mín,
eru teir tiknir av lívi?

39.
Sjúrður so til orða tekur,
letur so orðum fúka:
Nú er komin riddarin tann
ið tú mást undir lúta.

40.
Hertugin so til orða tekur,
bæði følin og nipin:
Man ikki Brunsvík móti standa
einum orlogsskipi?

41.
Svaraði Sjúrður, hertugans son,
heldur á búnum knívi:
Tú verður tann fyrsti í Brunsvík var,
ið tikin verður av lívi.

42.
Tað var Sjúrður hertugans son,
letur so orðum víkja:
Nú er komin riddarin tann,
ið Adalín fær sín líka.

43.
Gingu teir frá strondum niðan,
ríkir menn og reystir,
lunnar brustu og jørðin skalv,
teir settur knørr í neystið

44.
Gingu teir frá strondum niðan
í skarlak vóru teir klæddir,
reyðargullhjálm á høvdi bóru,
teir vóru av ongum ræddir.

45.
Mitt í miðjum graasagarði
aksla teir síni skinn,
og so búnir ganga teir
í høgar hallar inn

46.
Og so búnir ganga teir
í høgar hallar inn,
sum hertugin yvir borðið sat
við monnum hundrað fimm.

47.
Sniálvur gekk í høllina inn,
í forðum var tann siður,
hevur alt í einum orði,
heilsan og hann biður.

48.
Sniálvur stendur á hallargólvi,
ber upp kvøður sína:
Sit væl reysti hertugi,
gev mær dóttur tína.

49.
Leingi sat tá hertugin,
hugsar um tey ráð,
hvussi hann skuldi Sniálvi
eitt hánligt andsvar fá.

50.
Tað er so mangur riddari
frú Adalín vil hava
eg læt teir í tornið seta,
allar av lívi taka.

51.
Tá svaraði Sniálvur,
á hallargólvi gekk:
Hertugi gev mær tína dóttur,
hon er bæði von og tekk.l

52.
Tað er so mangur riddari
frú Adalín vil fá,
eg læt teir í tornið seta
allar av lívið gá.

53.
Sniálvur stendur á hallargólvi
hyggur niður for seg:
hertugi, gev mær tína dóttir
eg biði ei longur teg.

54.
Tað er so mangur riddari,
frú Adalín vil gilja
eg læt teir í tornið seta
ímóti sínum vilja.

55.
Sit væl reysti hertugi,
legg tær væl í minni,
sig mær antin nei ella ja,
eg biði ei fleir sinni.

.56
Vil tú ikki tína dóttur
geva og so gifta,
eg bjóði tær eitt annað boð
lív skal londum skifta.

57.
Vil tú mær ikki tína dóttur
gifta í mín haga,
tað skal verða deyði tín
og fleiri dreingja skaði.

58.
Tað var reysti hertugin,
hann sortnar sum ein mold:
Gangið eftir frú Adalín,
leiði hana fram á fold.

59.
Hon stóð upp úr gyltum stóli
við fylgismoyggjar tólv,
so gekk frúgvin Adalín
inn á hallargólv.

60.
Fram gekk frúgvin Adalín
ljós var hon um enni,
eingin tann, í Brunsvík var
líktist aftur at henni.

61.
Svaraði frúgvin Adalín
fyrsta orðið tá:
eg hevði hug á Sniálvi
áður enn eg hann sá.

62.
Svaraði frúgvin Adalín
gull bar sær á hendi:
eg hevði hug á Sniálvi,
áður enn eg hann kendi.

63.
Fram gekk frúgvin Adalín
rætti fram ljósa hond,
lystiligt var at lýða á
teirra festarbond.

64.
Fram gekk frúgvin Adalín
rætti hond yvir borð,
lystiligt var at lýða á
teirra festarorð.

65.
Eg kann ei við orðum greiða
teirra tungu mein,
hertugin fylgdi sína dóttur
ytst á flóðar stein.

66.
Sniálvur so til orða tekur
alt fyri uttan trega:
nógv er gull á Upplondum
sjálva teg at gleða.

67.
Vant hann upp síni silkisegl
út í havið setti,
mikil var tann mannamúgva,
ið stóð á landi eftir.

68.
Vant hann upp síni silkisegl,
gulli vovin við rand
strikar ei á bunka niður
fyrr enn við Uppland.

69.
Millum báðar stavnarnar
skínur so fagur litur,
sum hon frúgvin Adalín
í lyftingini situr.

70.
Millum Báðar stavnarnar
skín so fagurt á,
sum hann reystur Sniálvur
frúnni situr hjá.

71.
Hagar ið teirra snekkja
kendi fagurt land,
lótu síni akker falla
á so hvítan ssand.

72.
Lótu síni akker falla
á so hvítan sand,
fyrstur stígur Sniálvur
sínum fóti á land.

73.
Fyrstur stígur Sniálvur
sínum fóti á land,
so hon frúgvin Adalín
undir hans høgru hond.

74.
Tók hann frúnna Adalín
lyfti á land við sær:
Gud og milda Maria moy
veri nú við tæl.

75.
Silki og so perlur
var eftir vegnum prangað,
ei mátti frúgvin Adalín
á berum jørðum ganga.

76.
Silki og so perlur
var eftir vegnum breitt,
so var frúgvin Adalín
niðan til hallar leidd.

77.
Mitt í miðjum grasagarði
aksla síni skinn
so gekk hann í høgaloft
for sína móður inn.

78.
Tað er ungi Sniálvur
mælir av tungum inna:
Nú er komin frúgvin tann,
tú segði, eg kundi ikki vinna.

79.
Svaraði hansara sæla móður
sá ta brúður bjarta:
Góða stund so bar eg teg
fyri mínum hjarta.

80.
Drukkið var teirra brúdleypið
gott var teirra lív,
gingu so bæði í eina song
Sniálvur og hans vív.

81.
Drukkið var teirra brydleypið,
bæði við gleði og gaman,
tað var stytst av ævini,
íð tey vóru saman.

82.
Adalín vaknar í miðjari nátt
telur sín dreym so brátt:
Undarligt hevur fyri meg borist
alla hesa nát.

83.
Meg droymdi tú reið á grønum vølli
við tínum hjálmi kæra.
hagar kom ríðandi riddarin tann,
ið feldi teg niður til jarðar.

84.
Meg droymdi, tú reið á grønum vølli
bar so tunga trá,
har kom ríðandi riddarin tann,
ið høgdi títt høvur frá.

85.
Tað er ungi Sniálvur
letur so henni svara:
Hann er eingin í verðini,
meg fellir til jarðar.

86.
Svaraði frúgvin Adalín,
mælir av tungum inna:
Hann er eingin í verðini,
sín líka kann ikki finna.

87.
Hevur tú hoyrt frá móður hans
vándan gerning kann,
hann er vænur og vakstraligur
Ásmundur eitur hann.